Tórshavn 14. september 2015

# Innbjóðing

## til seminar um vaksnamannalæru

**http://nvl.org/**

## NVL – norðurlendskt netverk fyri vaksnamannalæru – bjóðar tær til seminar um VÚ týsdagin 29. september 2015, frá kl. 13.00 – 17.00, á Parnassinum á Hotel Hafnia.

VÚ, ið er stytting fyri vaksnamannaútbúgving og lívlanga læru í breiðari merking, er eitt raðfest øki í norðurlendskum samstarvi. Eitt av málum NVLs er at kunna um førleikar og royndir innan vaksnamannalæru í norðurlondum, so tí verður á hesum seminari ljós varpað á visión hjá Ráðharraráði Norðurlanda fyri samstarv, netverkan og raðfestingar innan VÚ-økið, hví vaksnamannalæra er eitt raðfest átaksøki í norðurlondum, og hvussu støðan viðvíkjandi grundleggjandi førleikum hjá vaksnum sær út í grannalondum okkara. Eisini verður VÚ-økið í Føroyum, sum tað sær út í dag, lýst úr ymsum sjónarhornum, og lagt verður upp til kjak um, hvussu vit fáa tikið fyrstu stigini til at fyrireika og seta á stovn eina skipaða vaksnamannaútbúgving, ið byggir á hugsjónina um lívlanga læru.

**Fyrilesarar:** Antra Carlsen, høvuðssamskipari NVLs, ið umrøður norðurlendskar raðfestingar, og Anders Rosdahl, granskingarleiðari, ið greiðir frá kanningarúrslitum av grundleggjandi førleikum hjá vaksnum borgarum í norðurlondum (PIAAC-kanningin). Harafturat verða fleiri styttri framløgur, ið lýsa verandi støðu og tørv á VÚ úr ymsum sjónarhornum. Eftir framløgurnar verður høvi at skifta orð um fyrilestrarnar og støðuna í Føroyum við atliti til umrøddu evni.

**Málbólkur:** Myndugleikar, fakfeløg, áhugafeløg, arbeiðsgevarar, politikkarar, vegleiðarar, lærarar, granskarar, umboð fyri útbúgvingarstovnar og annars øll, ið hava áhuga fyri hesum evni.

**Tilmelding:** Tilmelding fer fram við at senda ein t-post til AnnaT@setur.fo , har tú upplýsir ***navn***, *t-post og* ***arbeiðsstað*** (felag/stovn/skúla/myndugleika, osfr).
Freistin at boða frá luttøku er fríggjadagin 25. september kl. 12.00.

***GG. tiltakið er ókeypis, men neyðugt er at boða frá luttøku.***

Øll áhugaði eru vælkomin!

Vinaliga vegna **NVL** og samstarvsbólk NVLs

Elisabeth Holm, NVL-kontaktpersónur,

Fróðskaparsetur Føroya

norden

Nordic Network for Adult Learning